RenoVent

*Bjálva við*

# Pappírsull



**Í USA hava tey brúkt pappír at bjálva við í uml. 100 ár, og tað hevur verið framleitt ídnaðarliga síðan 1945. Eftir annan heimsbardaga kom pappírsbjálving til Evropa og og í Danmark hevur Papiruld Danmark framleitt tað síðan 1989.**

Pappírsull er innantómar sellulosutrevjur, ið stava frá innsavnaðum dagbløðum. Pappírið hevur tað rætta einsháttaða innihaldið av sellulosutrevjum, og tey eru prentað við eiturleysum litum.

Pappírsull verður brúkt sum granulat, ið verður blást inn, har tað skal verða. Hendan bjálvingin er munandi dygdarbetri enn mottur, tí Pappírsull leggur seg heilt inn at rørum og innleggingum og fyllir allar sprungur og rivur.

## Eingin kuldabrúgv

Tá tú bjálvar við Pappírsull fær tú ongar rivur, sprungur ella holrúm, sum ikki verða bjálvað. Pappírsullin legst heilt tætt rundan um rør og skeivar formar.

## Eingin væta

Pappírsull er einans innantómar sellulosutrevjur og ikki minerallullartrevjur, sum eru innanheilar. Mineralull missir bjálvingarevni, tá tað verður vátt og krevur tí tætta dampsperru. Pappírsull er lívrunnið tilfar, sum leiðir vætuna burtur og loyvir húsinum at anda. Tí slepst ofta undan dampsperru, tá tú brúkar Pappírsull aðrastaðni enn í baðrúmum. Tað gevur náttúrligari og betri inniluft.

PAPIRULD.DK
EFFEKTIV ISOLERING

## Papiruld Danmark A/S

Papiruld Danmark hevur verið til í meir enn 20 ár og æt upprunaliga Miljøisolering ApS. Papiruld Danmark er tann einasti, sum framleiðir bjálvingartilfarið pappírsull í Danmark.

Høvuðsskrivstovan og framleiðsluhøllin hjá fyritøkuni eru í Hillerød.

Øll árini hava vit havt umhvørvið í huga. Vit brúka "grønan streym" og tryggja okkum, at vit dálka umhvørvið minst møguligt. – samstundis sum vit hjálpa tykkum at minka $CO^2$ útlátið.



# Pappírsull

### Dygdargóð hitabjálving.

Varmaleiðingarevnini í Pappírsull eru smb VIF (VarmeisoleringsForeningen) kunngjørd at vera 0,040 W/mK. Varmaleiðingarevni verður nevnd Lambda-virðið.

Fyri Pappírsull er lambdavirðið 40, og Pappírsull er harvið av allarbesta bjálvingartilfari. (tess lægri lambdavirði, tess betri bjálvingarevni).

### Dygdargóð brandmótstøða

Pappírsull brennir ikki. Royndir, sum Dansk Brandteknisk Institut hevur gjørt eins og royndir í sjónvarpi vísa, at Pappírsull er líka brandtálmandi sum steinull og hevur betri mótstøðu móti eldi enn t.d. glasull.

Fleiri ferðir um dagin taka vit stakroyndir, sum verða testaðar við blásilampu.

Pappírsull er sellulosutrevjur, sum eru viðgjørdar við søltum, so tað tálmar eldi.

### Dygdargóð ljóðbjálving

Ljóðroyndir, sum Nordsjællands Akustik ApS hevur gjørt, vísa, at Pappírsull bjálvar munandi betur fyri ljóði enn bæði steinull og glasull.

Tann stóri munurin í ljóðávirkanini stendst av eginleikunum í Pappírsullini við innantómu sellulosutrevjunum, sum forða ljóði í at treingja ígjøgnum.

### Einki rot, hýggj ella skaðadjór

Í Pappírsullina er latið borax, sum er evnafrøðiliga sambinding av bor, ilt og natrium (salt). Borvatn kenna vit frá eygnaskolivætu og tað verður eisini brúkt at reinsa sár við. Borax ger Pappírsull óforgeingiliga og forðar fyri roti og hýggi. Søltini, sum Pappírsullin verður vard við, virkar uppturkandi upp á skaðadjór, og kykt kunnu ikki liva har. Borax er haraftrat brandtálmandi.

## Hví bjálva við pappírsull



Bjálving við máttum



Bjálving við pappírsull



Bjálving við máttum rundan um rør



Bjálving við pappírsull rundanum rør



